## Starv

# Ferðslusamskipari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum ferðslusamskipara til fólkaflutningsdeildina, t.e. Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.
Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- akstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá ferðslusamskiparanum**
Høvuðsuppgávan hjá ferðslusamskiparanum verður at tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av dagliga fólkaflutninginum innan Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir.

Uppgávurnar hjá ferðslusamskiparanum verða m.a.:

- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagliga fólkaflutninginum
- Fyrisita koyri- og vaktarskipanir
- Eftirlit við koyrisáttmálum
- Fyriskipa bíleggingar
- Gera flutningsavtalur
- Verða við í arbeiðinum at gera ferðaætlan
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Førleikakrøv**

- Útbúgving innan ferðslustýring e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Góðan kunnleika og royndir innan edv á brúkarastøði
- Kunnleiki til formlig krøv innan rakstur av ferðamannaskipum og akførum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har ferðslusamskiparin skal vera til við at víðari menna hesa funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Vakt eftir vanliga arbeiðstíð.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***ran ara k an n***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 1. august 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Poul Jákup Thomsen,

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Umlættingarfamilja Fosturfamilja

Barnaverndin hjá Klaksvíkar Kommunu søkir við hesum eftir familjum úr øllum Føroyum, ið hava hug og umstøður at gerast umlættingarfamilja ella fosturfamilja.

**Umlættingarfamilja:**
Er familja, ið átekur sær at hava barn/børn við ávísum tørvi búgvandi í t.d. vikuskiftum ella ávíst dagatal í senn, alt eftir hvat avtala verður. Uppgávan er at vera um barnið og geva tí tryggar umstøður. Talan kann eisini verða um uppgávur, har umlættingarfamiljan trakkar til, vegna ófullfíggja trygdarnet hjá biologisku familjuni.

**Fosturfamilja:**
Er familja, ið átekur sær at hava barn/børn við ávísum tørvi fastbúgvandi í styttri ella longri tíðarskeið, tí umstøðurnar hjá biologisku familjuni av ymiskum orsøkum kunnu hava ávirkan á vælferðina hjá barninum.

**Tit fáa:**
– spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
– tætt samstarv við fakfólk á sosialu deild
– supervisión
– samsýning

**Vit vænta:**
– at familjan er vælvirkandi
– at tit hava stundir til børn
– at tit hava gevandi samband við børn
– at tit eru samstarvshugað mótvegis biologisku familjuni, barnaverndini og øðrum samstarvspørtum
– at tit eru sinnaði at vera við í bólki av fosturfamiljum, sum hittast av og á

Áhugaðar familjur kunnu fáa nærri upplýsingar við at venda sær til Sigrun Vágstún á tlf. 456388.

Umsóknir skulu vera inni í seinasta lagi 8. juli 2001 og sendast til:

**Barnaverndarnevndin**
Klaksvíkar Kommuna
Postboks 2
700 Klaksvík

# Bílig heilárs/-summarhús

á Salling, tætt við Limfjørðin, til sølu.

Møguleikar fyri útleigan.

# Frá Fuglafjarðar kommunu

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá 09. juli – 27. juli 2001.

**Fuglafjarðar kommuna**

# Pedagogar

Vit søkja eftir tveimum pedagogum. Eitt fast starv á 32 tímar og eitt farloyvisstarv í eitt ár á 32 tímar.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum verður at senda seinast 21. juli.

Størvini verða sett umleið 15. august ella eftir avtalu.

Løn sambært galdandi sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita á tlf. 312854.

**Sankta Jósefs Barnagarður**
Varðagøta 12
Tórshavn

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg






# JUNGLUTRUMMU-SLÁARAR SØKJAST ...

Vit eru eitt vælvirkandi orkestur við nógvum spennandi uppgávum, men okkum tørvar tveir nýggjar junglutrummusláarar - gjarna við royndum - at byrja skjótast gjørligt.
Við hvørt spæla vit andante, men sum oftast er tað full ferð á kassanum.
Um tónaartin er PC ella Mac er ikki áhugavert. Samljóð og kreativitetur eru tað harafturímóti!

Um tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, ert kreativ/ur og før/ur fyri at framleiða væl og skjótt og samstundis hevur trúgv til tín sjálvs og ert tríggjar av útsøgnunum niðanfyri, so ert tú kanska rætti persónurin:

❑ Eg dugi væl at brúka InDesign ella QuarkXpress

❑ Eg dugi væl at brúka CorelDraw Adobe Illustrator ella FreeHand

❑ Eg dugi væl at brúka PhotoShop

❑ Eg dugi væl at brúka DreamWeaver

❑ Eg dugi væl at arbeiða við 3D og video

Heldur tú teg hava staðið royndina og hevur tú hug at gerast partur av einum góðum orkestri, so skalt tú ikki ivast, men skriva eina umsókn í stundini ella í seinasta lagi 10. juli 2001 og senda hana saman við viðmæl-um og dømum um gjørdar uppgávur til adressuna niðanfyri.
Lønina tosa vit um, og er okkurt annað, tær tørvar at spyrja um, kanst tú ringja tel 316511 og spyrja eftir Johnny Gaard, stjóra.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

team 85

Hoyvíksvegur 59, Postboks 3138, FO-110 Tórshavn
Tel 316511, Fax 310390, www.team85.fo, jg@team85.fo

*Team 85 er reklamuvirki við 10 starvsfólkum. Kundar okkara eru fyritøkur í privata vinnulívinum og stovnar, m.a. Agip Faroe Branch, Atlantic Supply Base, Ferðaráð Føroya, Föroya Bjór, Føroya Shell, Føroya Sparikassi, FøroyaTele, Kloosterboer, LM-Handilin, Løgmansskrivstovan, Menningarstovan, North Atlantic Fish Fair, Smyril Line, Tórshavnar kommuna, Vónin o.m.a. Umframt vanligt reklamuvirksemi framleiðir Team 85 eisini sjónvarpslýsingar, og í beinleiðis sambandi við teknistovuna hevur Team 85 framkomna verkstovu, har framleidd verða lýsingaskelti, framsýningabásar, bilprýðingar, busslýsingar, útprent í stórum støddum v.m.*




# Skrá á Sundalagsstevnuni

## í Hvalvík 05. til 08. juli 2001

**Hósdagur 05.07.2001**

| | |
|---|---|
| kl. 19:00 | Stevnubingo á skúlaloftinum |
| kl. 20:00 — 22:00 | Listaframsýningin í skúlanum letur upp |

**Fríggjadagur 06.07.2001**

| | |
|---|---|
| kl. 19:00 — 22:00 | Listaframsýning í skúlanum |
| kl. 19:00 — 23:00 | Tivoli og hoppiborg í skúlagarðinum |
| kl. 19:00 — 22:00 | Gogartkoyring á fótbóltsvøllinum |
| kl. 19:00 — 22:00 | Motorsúkklukoyring fyri børn á fótbóltsvøllinum |
| kl. 19-00 | Borðtenniskapping á Skúlaloftinum |
| kl. 20:00 — 24:00 | Tónleikacafé í Streymahúsinum |
| kl. 20:30 — 22:00 | Barnadiskotek í teltinum |
| kl. 23:00 — 04:00 | DJ-Show í teltinum |

**Leygardagur 07.07.2001**

| | |
|---|---|
| kl. 13:45 | Skrúðgonga, skótar og ítróttarfólk ganga frá gamla skúla til kommunuskrivstovuna, har Fuglafjarðar Hornorkestur spælir |
| kl. 14:00 | Sundalagsstevnan 2001 verður sett av Jákup Suna Joensen, løgtingsmanni<br>Aftaná fer skrúðgongan út á kajøkið |
| kl. 15:00 | Kapproður<br>Aftaná handar Niels Petersen steyp og heiðursmerkir til vinnandi bátarnar |
| kl. 15:00 | Tombola og matsøla á kapproðrarøkinum |
| kl. 17:00 — 23:00 | Matsøla í skúlanum |
| kl. 18:00 — 22:00 | Gogartkoyring á fótbóltsvøllinum |
| kl. 18:00 — 22:00 | Motorsúkklukoyring fyri børn á fótbóltsvøllinum |
| kl. 18:00 — 22:00 | Listaframsýning í skúlanum |
| kl. 18:00 — 23:30 | Tónleikacafé í Streymahúsinum |
| kl. 18:00 — 01:00 | Tivoli og hoppiborg í skúlagarðinum |
| kl. 19:00 — 21:00 | Barnadiskotek í skúlaloftinum |
| kl. 21:00 | Útimøti við kommunuskrivstovuna við luttøku frá Evangeliuhúsinum<br>Aftaná verður sangløta á skúlaloftinum |
| kl. 24:00 | Midnáttarrøða við kommunuskrivstovuna, Heðin Zachariasen, borgarstjóri heldur røðu<br>Aftaná verður fýrverk |
| kl. 00:30 — 04:00 | Dansur í teltinum, Driv spælir |

**Sunnudagur 08.07.2001**

| | |
|---|---|
| kl. 11:00 | Kirkjugudstænasta v/ Ingu Poulsen Dam, presti |
| kl. 14:00 | Kappsigling á kapproðrarøkinum<br>tilmelding fer fram á tlf. 422262 fríggjakvøldi 6/7 millum kl. 19:00 og 21:00 |
| kl. 15:00 — 20:00 | Listaframsýning í skúlanum |
| kl. 15:00 — 20:00 | Gogartkoyring á vøllinum |
| kl. 15:00 — 20:00 | Motorsúkklukoyring á vøllinum |
| kl. 15:00 — 22:00 | Tivoli í skúlagarðinum |
| kl. 15:00 — 22:00 | Matsøla í skúlanum |
| kl. 15:00 | Familjutiltøk við kommunuskrivastovuna |
| kl. 15:00 | Súkklukapping |
| kl. 17:00 | Neytalortakapping |
| kl. 19:00 | Útimøti við kommunuskrivstovuna viðluttøku av Magna Christiansen og Jóannes Fonsdal<br>Aftaná verður hugnaløta í missiónshúsinum |